## Kanning: Meiriluti fyri nýggjum radara, at føroyingar reka hann, men ikki fyri at gjalda hann

Úrslitini av nýggjari kanning um trygdar-og verjumál vísa m.a., at tað er meiriluti fyri nýggjum radara á Sornfelli, at tey flestu vilja hava føroyskar myndugleikar at reka hann. Men at ein meiriluti kortini er ímóti, at føroyingar sjálvir gjalda fyri radaran.

Tað er Spyr, sum hevur gjørt kanningina fyri Javnaðarflokkin á fólkatingi. 500 fólk vórðu spurd um miðjan september 2021. Óvissan er upp til 3,5%.

(Aftast eru úrslit frá tveimum spurningum í februar 2021 um somu mál. Legg til merkis, at spurningarnir í summum førum eru øðrvísi orðaðir, og at hetta kann ávirka svarini.)






**Q3. Heldur tú, at Føroyar framhaldandi skulu hoyra til vesturlendsku verjusamgonguna, NATO?**




**Q4. Um tú skuldi valt, hvør skuldi so verið okkara sameindi, tá tað kemur til verju-og trygdarpolitikk?**




**Q5. Løgmaður segði her fyri, at Føroyar hoyra til vesturheimin, og at vit hava sama virðisgrundarlag sum vesturheimurin. Í hvønn mun tekur tú undir við hesum?**



**Q6. Tekur tú undir við, at ein lofteftirlitsradari verður settur upp í Føroyum?**




**Q7. Um ein radari skal setast upp í Føroyum, heldur tú so tað hevur týdning, at tað eru føroyskir heldur enn danskir myndugleikar, sum reka hann?**




**Q8. Eftir ætlan skal Danmark fíggja uppsetingina og raksturin av radaranum, og upplýsti prísurin fyri uppsetan er 380 mió. kr. Heldur tú, at Føroyar sjálvar skulu seta upp radaran og rinda fyri uppsetan og rakstur?**



**Q9. Heldur tú, at Føroyar skulu loyva amerikanskum herskipum at leggja at føroyskum havnum at bunkra, proviantera, gera manningarskifti og annað?**




**Q10. Umframt Danmark hava Føroyar politisk og handilslig sambond við nógv onnur lond. Hvønn av hesum heldur tú, tað er týdningarmest at hava góð sambond við?**




Q11. Ert tú samd(ur) í hesum: "Tað ber væl til at hava gott politiskt og handilsligt samstarv við USA og Russland samstundis."?
45%
40%
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
32%
39%
7%
2%
20%
Púra samd
Samd
Ósamd
Púra ósamd
Veit ikki


Q12. Ert tú samd(ur) í hesum: "USA og NATO eru við til at tryggja heimsfriðin."?
40%
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
21%
36%
12%
5%
25%
Púra samd
Samd
Ósamd
Púra ósamd
Veit ikki

**<u>Spurningar í Spyrumfari í februar 2021</u>**

**“Heldur tú, at Føroyar skulu hoyra til NATO?”**

**”Skulu vit geva loyvi til, at ein hernaðarligur radari verður settur upp í Føroyum?”**


Heldur tú, at Føroyar skulu hoyra til NATO? (februar 2021)
21%
13%
65%
Ja
Nei
Veit ikki


Skulu vit geva loyvi til, at ein hernaðarligur radari verður settur upp í Føroyum? (februar 2021)
22%
21%
57%
Ja
Nei
Veit ikki